**Sands Kommuna** ... trygd & trivnaður fyri øll
Telefon 661.030 • Telefax 361.734 • Postbox 10 • Mørkin Mikla 3• FO-210 Sandi
T-postur: sandur@sandur.fo
Peningstovnar: 6460-1012691 & 9181-4983043

Løgmansskrivstovan
Tinganes
100 Tórshavn

Sandur 17. november 2025

**Hoyringarskriv um Suðuroyartunnilin – vegaføring umvegis Sands bygd**

Sands kommuna vil við hesum enn einaferð gera viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.

Sands kommuna vísir sum heild til tey sjónarmið, sum blivu skrivað í hoyringarskrivinum frá Sands kommunu tann 12. desember 2024. Tað, sum víst varð á í hesum hoyringarskrivi, er enn líka so aktuelt sum tað var fyri einum ári síðani, tá tað eisini hevði alstóran skund at fáa samtykt eitt lógaruppskot um Suðuroyartunnilin.

Hoyringarskrivið frá 12. desember 2024 er hjálagt hesum hoyringarskrivinum.

Sands kommuna skipaði tann 12. november 2025 fyri borgarafundi á Sandi í sambandi við uppskotið, sum nú fyriliggur. Eisini í ár var sera nógv fólk á fundi. Fundarfólkið var samt um og endurtók, at skeivar avgerðir um linjuføring umvegis Sands bygd fara at hava við vanlukkuligar fylgjur fyri bygdina og harvið fyri oynna alla.

Sands kommuna undrast sum heild yvir, at tað at síggja til verður farið so lætt um vegaføringina um Sandoynna og serliga Sands bygd. Tað undrar eisini Sands kommunu, at tað verður farið so lætt um sjónarmiðini og ynskini hjá einari samdari Sands bygd.

Heimasandsfólk unna enn sum áður sera væl suðuroyingum eina trygga og góða farleið. Fyri fólk á Sandi ber tó ikki til at skilja, at tað verður hugsað um at leggja vegin í Sandoynni á ein hátt, sum tað er so stór mótstøða ímóti á Sandi. Hvat er vunnið við einari farleið til Suðuroynna, um hon ger stóran skaða á pláss, um liggja á vegnum til Suðuroy.

Sands kommuna biðjur um, at samráðingar sum skjótast verða tiknar upp við Sands kommunu um eina skilagóða loysn fyri ferðsluna frá Sandoyartunnlinum til Suðuroyartunnilin.

**Eingin vegaføring gjøgnum Sands bygd.**

Tað er eitt krav frá Sands kommunu vegna alt fólkið, sum býr á Sandi, at eingin vegur verður gjørdur gjøgnum Sands bygd frá Sandoyartunnlinum til Suðuroyartunnilin.

Sands kommuna vil í hesum sambandi vísa til tær grundgevingar, sum vórðu settar fram í hoyringarskrivi frá Sands kommunu frá 12. desember 2024. Ein vegur gjøgnum Sands bygd vil millum annað føra til, at Sands bygd verður klovin í tvey. Hetta vil eisini í stóran mun forða fyri møguligum útbyggingum av Sands bygd í framtíðini.

Tí vil Sands kommuna eins og bygdarfólkið harliga mótmæla at vegurin verður gjørdur gjøgnum bygdina. Tað uppskotið, sum nú fyriliggur, har øll ferðslan verður førd gjøgnum bygdina umvegis rundkoyringar, vil oyðileggja bygdina.

Tann tunga ferðslan, sum vil ganga ígjøgnum bygdina í øllum byggitíðarskeiðinum, vil eisini dálka illa í bygdini og hava við sær eitt sera ringt umhvørvi í alla ta tíð, sum tunnilin kemur at standa í gerð.

**Vegaføringin má leggjast føst nú**

Sum víst varð á í hoyringarskrivi frá 12. desember 2024 so má vegaføringin leggjast føst áðrenn farið verður í gongd við at bora Suðuroyartunnilin.

Sands kommuna metir, eins og bygdarfólkið, at besta loysnin er hon hjá alternativa tunnilsbólkinum, har tunnilin fer niður norðan fyri Múlan, upp í Skúvoy og so til Sandvíkar. Hetta vil vera tann skilabesta loysnin fyri fólkið í Suðuroy, fyri Heimasandsfólk, eins og hendan loysnin vil tryggja fast samband til Skúvoyar.

Hendan loysnin, har tunnilin fer niður norðan fyri Múlan, vil eisini spara Sands bygd fyri teimum oyðileggingum, sum núverandi uppskot hjá Tunnilsfelagnum vil hava við sær fyri bygdina.

Um valt verður ímóti fólkaviljanum i Sands bygd, at halda fast við linjuføringina í uppskotinum, er tað eitt treytaleyst krav frá Sands kommunu, at atkoman til Suðuroyartunnilin verður løgd uttanum Sandsbygd, bæði í byggitíðarskeiðnum og eftir at tunnilin er tikin í brúk. Tí mugu eventuellar atknýttar verkætlanir at fremja hetta, verða knýttar at útbjóðingini beinavegin, og verða framdar áðrenn sjálv byggingin av Suðuroyartunlinum fer av bakkastokki.

**Samanumtikið**

Sum nevnt omanfyri, so vil Sands kommuna sum heild vísa til tær viðmerkingar, sum blivu gjørdar í hoyringarskrivinum 12. desember 2024.

Sands kommuna heitir staðiliga á Løgmansskrivstovuna um at broyta uppskotið, soleiðis at ein tunnil til Suðuroy ikki verður ein vanlukka fyri Sands bygd.

Sands kommuna biður um fund við Løgmansskrivstovuna, um uppskotið verður sent til Løgtingið soleiðis at Sands kommuna fær ført síni sjónarmið fram. Fyrireikararnir av alternativa uppskotinum eiga eisini at verða bodnir á fund, soleiðis at greiðast kann frá uppskotinum.

Vegna Sands kommunu

Kristian Oskar Henriksen,

borgarstjóri